dagbókin

Læknavaktirnar

Tórshavn: Í dag Sølvi W. Olsen, tlf. 16611. Í morgin Álvur av Kák, tlf. 12557.
Eysturoyggin: Pól Olsen, tlf. 47010
Norðuroyggjar: Ólavur Gaard, tlf. 56900
Suðuroyggin (norður): Tlf. 71560
Suðuroyggin (suður): Tlf. 73030

Tannlæknavaktin, Tórshavn

Bráðfeingishjálp fæst í dag og í morgin kl. 13—14. Tlf. 14544.

Gudstænastur

Havnar kirkja: Hans J. Joensen
Vesturkirkjan: Kjartan Mørkøre
Hestur: Høgni Poulsen
Saksun: Martin R. Jacobsen
Eiði: Petur Martin Rasmussen
Skáli: Petur Petersen
Klaksvík: Henning Bøgesvang, altargongd
Mikladalur: Niels P. Danielsen, altargongd
Miðvágur: David Johannesen
Mykines: Finn Rosenberg, altargongd
Sandur: Systir Juliana
Skúvoy: E. Olsen, stud, theol.
Húsavík: Bergur Jacobsen
Hvalba: Elsa Funding kl. 11, altargongd
Famien: Elsa Funding kl. 19, altargongd
Vágur: Bjarni Bæk

Barnagudstænastur

Í dag kl. 15 hevur Martin R. Jacobsen barnagudstænastu í Hósvíkar kirkju og kl. 16 Kjartan Mørkøre í Vesturkirkjuni.

Norea Radio Danmark

Millumbylgja 205 m (1467 kHz) kl. 22,15—22,30.

Mánadagin 31.: »Et ord med handling i«


Anker Kofoed Pedersen, trúboðari, hevur andakt. Erik Kjeldsen, Leif og Th. Evald syngja.

Norskar sendingar eru hvønn dag kl. 17,05 og mánadag-fríggjadag kl. 8,00 á 25 metra-bandinum. (11,7 mHz).

Evangeliska røddin

Sending á føroyskum frá Monte Carlo hoyrist hvørt mánakvøld kl. 23,30 á millumbylgju 205 m (1455 kHz).

útvarp føroya



Fastar sendingar
07,15 Veðurtíðindi
07,17 Morgunlestur
07,30 Veðurtíðindi og tíðindi
07,35 Tónleikur
08,00 Veðurtíðindi og tíðindi
08,05 Lurtarnir og vit spæla grammofon
09,00 Veðurtíðindi og tíðindi
09,05 Morgunlestur (e)
09,10 Liðugt
12,00 Middagskonsert
12,20 Veðurtíðindi og tíðindi
12,32 Døgurðatónleikur
12,50 Veðurtíðindi
12,51 Tónleikur
13,00 Liðugt
18,30 Veðurtíðindi og tíðindi
18,45 Nátturðatónleikur
20,00 Veðurtíðindi og tíðindi

Leygardagur 29.

13,00 **Barnaútvarpið**
2. partur av leikinum Emil úr Lønnebergi eftir Astrid Lindgren. Heini F. Petersen umsetti og Sigmund Poulsen leggur til rættis
13,45 **Miðvikan**
14,30 **Tornið á heimsins enda**
Minnisbrot eftir William Heinesen — 4. partur. Hans Thomsen umsetti og lesur
18,42 **Ítróttatíðindi**
19,00 **Frásagnir um kópaveiðu**
Oskar Hermansson leggur til rættis
20,00 **Úr plátusavninum**
Ove Olsen leggur til rættis
20,45 **Stuttsøgan »Tvískinningar«** eftir Jens Paula Heinesen.
Sverri Egholm lesur
21,15 **Summartónar**
21,55 **Hetta heilaga evangeliið.**
Jákup Magnussen
22,00 **Veðurtíðindi og tíðindi**

Sunnudagur 30.

14,00 **Veðurtíðindi og tíðindi**
14,10 **Kvøðuljómar**
15,30 **Ítróttur og tónleikur**
17,00 **Guðstænasta úr Miðvágs kirkju**
David Johannessen prædikar
18,00 **Tónleikur**
18,30 **Veðurtíðindi og tíðindi**
18,40 **Ítróttatíðindi**
18,50 **Tíðindi á grønlendskum**

Mánadagur 31.

19,00 **Úr ymsum heraðshornum**
19,20 **Grammofonkonsert**
Symfoni nr. 3 Opus 27 »Sinfonia Espansiva« av Carl Nielsen

Týsdagur 1. sept.

18,42 **Barnaútvarpið**
3. partur av leikinum »Emil úr Lønnebergi« eftir Astrid Lindgren. Heini F. Petersen umsetti. Sigmund Poulsen leggur til rættis
19,20 **Løg mær dámar**
3. sending hjá Úlvi við Høgadalsá

filmarfilmarfilmarfilmarfilmarfilmarfilma

Møk rennur Don

Møk rennur Don varar í útvið fýra tímar. Men tað bilar ikki. Ein kundi væl sitið í fýra tímar afturat, skrivaði ummælarin hjá Ekstrabladet, tá filmurin bleiv vístur í Danmark. Og hann var ikki einsamallur um at rósa hesum sovjetiska stórfilminum, sum Sergej Gerasimov hevur gjørt eftir skaldsøguni hjá Michail Sjolochov. Eisini hini blóðini góvu filminum góð ummæli.

Í Berlingske Tidende skrivaði Svend Kragh-Jacobsen, at leikstjórin hevur megnað at gjørt eina samanhangandi søgu burturúr tí nógva tilfarinum í skaldsøguni hjá Sjolochov, uttan tó at broyta dámin og linjuna hjá hesum. Hann er ein meistari í at leggja til rættis søgugongdina og leikstýra. Linjan í filminum er greið og týðulig. Tann synduga ástin millum kosakkin Grigorij og ta giftu Aksinju hevjar seg yvir allar tær nógvu hendingarnar. Og soleiðis er tað eisini í skaldsøguni.

Umframt at vera um ástina millum tey bæði, er filmurin um lagnuna hjá kosakkunum undir fyrra heimsbardaga, kollveltingini og borgarakrígnum aftaná. Filmurin er avbera væl leiktur og hann er eisini væl tikin. Sum málningar eru vetrarmyndirnar við tí hvíta kavanum, teimum brúnu økrunum og trøunum og tí gráa mjørkatáminum. Skemtiligir eru tilburðirnir í bygdini, tann størsti av teimum er brúdleypið við tí ovurhondsstóru átveitsluni og teimum litríku búnunum. Myndirnar av bardøgunum hava stóra ávirkan á áskoðaran, skrivaði Svend Kragh-Jacobsen m.a. Og hann endar grein sína við hesum orðum:

»Møk rennur Don er á allan hátt ein megnar filmur, sum hevur tað uppiborið, at sum flest siggja hann«.

Eisini B.T. hevði nógv góð orð um sovjetiska stórfilmin: í honum eru partar, sum ongantíð gloymast. Og har er sjónleikarakynstur av besta slag. Ikki bert høvuðsleiklutirnir, men eisini teir minstu eru latnir framúrskarandi listafólki.

Havnar Bio.

Sí eisini lýsing frá Havnar Bio á øðrum stað í blaðnum í dag

sosialurin

Telefonir okkara eru 14720 og 11820

Tit ringja



— vit skriva

Sjónvarpsfelagið

Leygardagur 29. august

19,30 **Jennifer og Michael 1 (7)**
19,50 **Natek-sending**
Hesa ferð siggja vit m.a. leiklutin hjá teknikkinum í framtøkuni í matvøruframleiðslu. Á Jydsk Teknologisk Institut verða smáir fiskar »límaðir« saman til stykki, sum eru væl egnað at skera til viðskera. Og við at brúka ein serligan teknikk verður eitt nýtt slag av morgunmati, »byggkúlur«, gjørt.
Men matur er ikki alt. Vit siggja eisini »bilin« á Århus kommunehospital. »Bilurin« avger, um fólk eru før fyri at koyra. Og vit siggja nýggjasta lokomotivið hjá DSB, eitt kraftverk og ein datamat á hjólum.
20,21 **TV í tjaldinum**
Hetta er seinasta undirhaldssendingin við Linie 3 og øðrum. Hesa ferð er tjaldið í Vordingborg
21,40 **Einsamallur hani**
Alan verður sligin niður av eini kvinnu, sum enntá eisini fer av stað við mappuni hjá honum. Men Alan vil ikki rættiliga kennast við hendingina
22,05 **Mótahúsið Scruples 3 (3)**
Meira úr USA. Billy skal giftast fyri aðru ferð. Maður hennara ætlar at gera ein film, sum hann vónar fær ein »Oscar«. Men hann er í dýrastu neyð við hesum. Og hjá Valentine og Spider gongst heldur ikki ov væl.
23,37 **Liðugt**

Sunnudagur 30. august

15,00 **Andalig sending**
15,45 **Schubert og lív hansara**
Sangirnir »Winterreise« hjá Schubert eru tann reyði tráðurin í hesi sending, sum BBC hevur gjørt. Seks av vinunum hjá tónaskaldinum tosa um liv og gerðir hansara.
Barytonsangarin Benjamin Luxon syngur og Gabrieli-kvartettin spælir kamarmusikk eftir Franz Schubert
17,25 **Liðugt**
19,30 **Sunnudagsbio**
Meira um Kickan, Mads og Pia, sum uppliva ymist áhugavert í náttúruni
19,57 **Ítróttur**
20,27 **Chiricahua**
Um oyðimarkar- og fjallaøkini í landssynningshorninum av Arizona. Har eru fleiri fuglasløg enn nakra aðrastaðni í Norður-Ameriku
21,00 **Hjálparorðið**
Spurnarkapping
21,35 **Flambards 12 (13)**
Christina hevur nú tvey børn at ansa eftir. Tað gongst ikki alt ov væl við landbúnaðinum. Og á eini veitslu kemur ein heilt óvæntaður gestur
22,30 **Andakt**
22,35 Liðugt

Týsdagur 1. september

19,30 **Summarbio**
Sending fyri børn
20,32 Tað skakandi nýggja 1 (8)
Listaummælarin Robert Hughes stendur aftanfyri hesar átta sendingarnar um listina í 20. øld.
Á ein sera persónligan, harðan og viðhvørt provokerandi hátt viðger Hughes listina.
Robert Hughes viðger í hesi fyrstu sendingini tey 30 árini frá 1913. Um hesi ár skrivaði rithøvundin Charles Peguy einaferð:
»Heimurin er broyttur meira hesi 30 árini enn øll árini frammanundan aftur til Kristi føðing«.
Robert Hughes er føddur í Australiu í 1938 og eftir at hava búð og starvast í Europa fór hann til USA í 1963.
21,33 **Sons and lovers**
Enskur filmur (sv/hv)
23,12 **Liðugt**

Filmssýningar fyri børn byrja aftur

Barnabókasavnið fer nú aftur at vísa filmar fyri børn. Sýningar verða hvønn mikudag kl. 16, tann fyrsta komandi mikudag. Vit fara her á síðuni so hvørt at greiða frá, hvørjir filmar verða sýndir. Ein økeypis skrá fyri september fæst eisini á Býarbókasavninum.